# 2002



***Juni:*** *Tað var eisini í juni, at tað varð almannakunngjørt, at Sunleif Rasmussen skuldi fáa Nordisk Musikpris frá Norðurlandaráðnum. Umframt heiðurin fekk Sunleif eisini ein kekk áljóðandi 350.000 kr.*



***Juni:*** *Eftir 127 ár í útlegd komu helst kendastu forngripir føroyinga, Kirkubøstólarnir, aftur til landið 20. juni*



***Juli:*** *Nógv rok spyrst burturúr, tá tingmaður Tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen, leggur Anfinn Kallsberg løgmann og Jørgin Niclasen landsstýrismann undir ikki at kenna mun á eins egna og annara. Løgmaður hevur tvær røður í lummanum á ólavsøku, ta vanligu og eina uppsøgn av samgonguni. Beint áðrenn evstamark, tekur Tórbjørn Jacobsen orðini í seg aftur, og samgongan heldur fram*



# 2002



***Juli:*** *Dreymurin gekk út hjá føroyska tónasmiðinum Teiti Lassen, tá hann fríggjadagin 26. juli skrivaði undir sáttamála við Universal Music, sum er heimsins størsta plátufelag. Sáttmálin fevnir um tvær fløguútgávur, sum skulu gerast innan 18 mánaðir.*



***September:*** *Sunnumorgunin 15. september kundi endað við einari syrgiligari vanlukku, tá ein bilur við trimum ungum fólkum fór niðan av vegnum í Kaldbaksfirði, bóltaði runt og lendi á takinum. Bilurin kroystist illa, men ungfólkini sluppu undan við lívinum, tí tey sótu í trygdarbelti*




***August:*** *Nýggja Norröna fer av bakkastokki í Lübeck 25. august, og tað fær tær stóru yvirskriftirnar fram: Eitt nýtt tíðarskeið byrjað í ferðavinnuni. Flaggskipið í Norðuratlantshavi. Nýggja Norröna fær alstóran týdning fyri útflutningin*